# Javnaðarflokkurin roynir aftur

**Jóannes Eidesgaard sigur, at um Føroya Banki skal einskiljast, so mugu vit varðveita fólksligu forankringina, tí í síni tíð var tað føroyski skattaborgaran, sum bjargaði bankanum**

EINSKILJINGAR-UPPSKOT
*Páll Holm Johannesen*

Í orðaskiftinum í løgtinginum um ólavsøkurøðuna hjá løgmanni, róð tingmaðurin hjá Fólkaflokkinum, Óli Breckmann, frammundir at farið verður undir at einskilja Føroya Banka, so kreppurakta alivinnan kann megna at hóra undan.

Í tí viðfangi ætlar nú Javnaðarflokkurin aftur at royna seg við uppskoti um at einskilja Føroya Banka. Uppskotið er júst tað sama, sum varð havt á lofti fyri góðum ári síðan.

– Í høvuðsheitum eru vit ímóti allari privatisering, men tað sýnist sum tað er ein meiriluti í løgtinginum um at fara undir einskiljingartilgongdina, men vit vilja ikki sita hendur í favn, og tí skjóta vit upp at einskilja á ein heldur ótraditionellan hátt, sigur formaður Javnaðarfloksins, Jóannes Eidesgaard.



*Javnaðarflokkurin roynir aftur við sínum uppskoti um at einskilja Føroya Banka. Hóast flokkurin í høvuðsheitum er ímóti einskiljing, so tykist meiriluti verða fyri einskiljingartilgongdini, og tískil vil flokkurin ikki sita hendur í favn, sigur Jóannes Eidesgaard*

### Fólksliga forankring

Uppskotið hjá Javnaðarflokkinum snýr seg um, at føroyingar, uttan mun til aldur, alt fyri eitt fáa 1000 krónur í part.

Henda upphædd svarar til góðar 50 milliónir, og fáa føroyingar 1000 krónur í fimm fylgandi ár, svarar tað til 250 milliónir krónur í partapeningi í Føroya Banka. Henda upphædd svarar til góð 25 % av samlaði partapeninginum í bankanum.

45% av partapeninginum í bankanum skulu seljast í fríari sølu. Seljast skulu bert 5% á hvørjum ári yvir eitt níggju ára áramál. Tey írestandi 30 % skulu framhaldandi verða landsins ogn.

Einskiljingaruppskotið hjá Javnaðarflokkinum, metir flokkurin verða ein afturbering til føroyska skattgjaldaran, sum í síni tíð bjargaði Føroya Banka.

– Jørn Astrup hevur fleiri ferð víst á týdningin hjá bankanum at hava eina fólksliga forankring, og hetta uppskotið er avgjørt við til at tryggja, at fólksliga forankringin verður varðveitt, sjálvt um bankin verður einskildur, slær Jóannes Eidesgaard fast.

Hann leggur afturat, at uppskotið kann verða við til at venja føroyingar at hava partabrøv um hendið. Tað er rættiliga vanligt í londunum rundan um okkum, at flest fólk hava partabrøv, og tey fylgja væl við, hvat fer fram á partabrævamarknaðinum.

Fyri flestu føroyingar er hetta nýtt fyribrigdi, og tískil kann uppskotið verða við til at venja fólk til at hugsa um partabrøv sum ein góðan agóða hjá teimum.

### Treytar av Landsstýrinum

Spurdur, um uppskotið veruliga verður lagt fyri løgtingið, svarar formaðurin í Javnaðarflokkinum, at tað treytar av, um Landsstýrið ger álvara av sínum ætlanum um at seta einskiljingartilgongdina í verk.

– Bæði Fólkaflokkurin og Sambandsflokkurin lótu væl at uppskotunum hjá okkum fyri einum ári síðan, men Tjóðveldisflokkurin er ímóti uppskotinum, og tískil er ivasamt, hvat fer at spyrjast burturúr, sigur Jóannes Eidesgaard at enda.

# Makrel aftur verið í upptøkuhølunum

**Makrel hevur tikið nýggja fløgu upp. Fløgan verður ætlandi í sølubúðunum um jóltíðir ella fyrst í komandi ári**

TÓNLEIKAÚTGÁVA
*Páll Holm Johannesen*

Í døgunum 1. til 5. august var tónleikabólkurin, Makrel, aftur í upptøkuhølunum. Í vár góvu teir fløguna, Makrel Stinkar, út, og næsta fløgan hjá bólkinum er nú á veg.

Sangarin í Markel, Ári Rouch, sigur, at talan verður um eina fløgu við í alt 13 skerðingum, og væntandi verður fløgan í sølubúðunum um jóltíðir ella fyrst í komandi ári. Fløgan er upptikin í Útvarpi Føroya, og er tað Jón McBirne, sum hevur staðið fyri upptøkunum.


*Karasmatiski sangarin í Makrel, Ári Rouch, metir nýggja fløgan hjá bólkinum vendir sær til ein breiðari skara av lurtarum, enn fyrsta fløgan hjá bólkinum, Makrel Stinkar*

Ári Rouch greiðir frá, at komandi fløgan er meira gjøgnumarbeidd enn tann fyrra. Hon er meira melodiøs, og væntast kann tí ein breiðari skara av lutarum.

Nærum allir sangirnir á fløguni er á enskum, fyriuttan tvey vers, sum eru sungin á føroyskum.

### Rasmus á tónleikaskúla

Makrel hava síðan teirra triðja pláss í Prix Føroyum spælt nógv kring landið, men í heyst verða teir ikki so nógv á palli. Gittarleikarin í bólkinum, Rasmus Rasmussen, fer eftir summarfrítíðina á tónleikaháskúla í Vig, har eitt nú fleiri limir í Deja Vu vóru fyri góðum ári síðan.

Uppihaldið hjá Rasmusi í Vig verður í hálvt ár, og tá hann vendir nøsina heimaftur, er ætlanin, at nýggja fløgan hjá bólkinum verður givin út. Ætlanin er tá at gera av nógv av at spæla kring landið, sigur Ári Rouch at enda.



# Nú skal ruddast upp

**Nú avgerðin um fiskiloyvið hjá Jógvani S er tikin og kunngjørd, stendur eftir at rudda upp í bæði umsiting og sjálvum lógarverkinum, sigur Jacob Vestergaard, landsstýrismaður við fiskivinnumálum**

JÓGVAN S
*Edvard Joensen*

Málið um Jógvan S hevur verið við til at skundað undir eina upprudding í lógini um vinnuligan fiskiskap. Eisini fer at verða hugt at mannagongdum innhýsis í Fiskimálaráðnum. Málið fer at fáa fylgjur fyri stovnin sum so, men Jacob Vestergaard, landsstýrismaður við fiskivinnumálum veit ikki, um tað eisini fær persónliga fylgjur fyri embætismenninar, sum hava avgreitt málið.

– Hetta málið er ikki liðugt enn. Nú fer eftirspælið at koma, sigur Jacob Vestergaard og sipar til at hann nú væntar, at reiðaríið hjá Jógvani S fer at leggja endurgjaldskrav móti Fiskimálaráðnum.

– Tað er gjørt eitt mistak í umsitingini av málinum, og tað havi eg nú rættað aftur. So fer aftan á at vísa seg, hvørjar fylgjurnar verða, sigur hann.


*Jacob Vestergaard fer at rudda upp í lógini um vinnuliga fiskiskap, eins og hann eisini fer at hyggja at arbeiðsgongdum í Fiskimálaráðnum. Men um málið um Jógvan S fer at fáa persónligar fylgjur fyri nakran, vil landsstýrismaðurin ikki siga nakað um*

Hvat endurgjaldið fer at ljóða uppá, sigur hann seg ikki hava nakað boð uppá. Men hann ivast ikki í, at tað kemur. Heldur ikki hevur hann nakað boð upp á, hvussu tað í so fall fer at spæla av.

Landsstýrismaðurin við fiskivinnumálum vísir til tær ymisku tulkingarnar, sum bæði politikarar, embætisfólk og løgfrøðingar hava av lógini um vinnuliga fiskiskap.

Tvær ymsar løgfrøðiligar kanningar hevur hann biðið um, og tær eru ikki samdar. Umframt hava so bæði umsitingin í Fiskimálaráðnum og Landsstýrismálanevndin gjørt sínar niðurstøður. So landsstýrismaðurin metir hetta fara at verða eitt mál fyri rættin at avgera.

Onnur hava heldur greiðari støðu. Eitt nú metir formaðurin í Felagnum Línuskip, Rólant Poulsen, sum av fyrstan tíð reisti málið um Jógvan S, at har er ikki so nógv at koma eftir, tí reiðaríið hevur longu frammanundan tvey fskifør, sum hava hvørt sítt veiðiloyvi. Tað, sum Jógvan S hevur havt fyribils, verður nú bara at taka sundur aftur og leggja út aftur til tey upprunaligu, heldur Rólant Poulsen.

Jacob Vestergaard, landsstýrismaður, sigur, at tað, at tilsøgnin nú er tikin aftur, merkir, at skipið skal gevast at fiska beinanveg. Tað sleppur ikki at halda fram til fiskiárið endar tann 31. august.

Jacob Vestergaard fekk í síni tíð sum uppgávu frá løgmanni at rudda upp í Fiskimálaráðnum, tá hann tók við sum landsstýrismaður.

Tað vil kortini ikki siga, at hann skuldi ganga runt og blaka fólk til hús, uttan heldur gera arbeiðsgongdir og lógarverk einfaldari og léttari at umsita og skilja, sigur hann.

Síðan hann tók við er í fyrsta lagi tað hent, at slík mál sum tað við Jógvani S ikki bara verða avgreidd á embætismannastigi, men fara altíð til landsstýrismannin eisini.

Um tað fer at virka við afturvirkandi kraft, og soleiðis kanska fáa fylgjur fyri teir embætismenninar, sum avgreiddu málið um Jógvan S, vil landsstýrismaðurin ikki siga nakað um.

At tað vóru tveir embætismenn, sum avgreiddu málið, komst av, sigur Jacob Vestergaard, at sum arbeiðsgongdin var tá, var tað vanligt at gera so.

– Hevði talan verið um eitt innflutt skip, var tað øðrvísi, tí so kom landsstýrismaðurin uppí. Men her var talan um skip, sum gott nokk var farið úr føroysku skrásetingini, men ongantíð skrásett aðrastaðni og tí framvegis varð roknað sum føroyskt skip, hóast eigararnir vóru útlendskir.

– Tað hevur ongantíð verið politikkur uppi í hasi avgreiðsluni, hóast Fólkaflokkurin hevur verið lagdur undir bæði líkt og ólíkt í hesum málinum, leggur Jacob Vestergaard dent á. Málið var eitt avgreiðslumál, sum fyrisitingin tók sær av.

At tað hevur drigið út við almannkunngeringini av niðurstøðu landsstýrismansins kemst av, at hann hevur vilja kunnað bæði egnan flokk og samgonguna um málið, áðrenn tað varð avgreitt endaliga, sigur hann. Men niðurstøðan, hann nú hevur kunngjørt, er tann sama, hann kom til fyri ólavsøku.

Spurdur um tað var full semja í Fólkaflokkinum um tað, hann hevur gjørt av, svarar Jacob Vestergaard, at tað er ikki viðgjørt í flokkinum, um avgerðin er røtt ella ikki. Flokkurin er bara kunnaður um tað, hann hevur gjørt av.

# Ferðafólkini brúka nógvar pengar

**Tað hevur mangar verið ført fram, at føroyingar fáa ikki tann vinning burtur úr ferðavinnuni, sum ynskiligt kundi verið. Men við kunningardiskin á flogvøllinum hava tey aðra áskoðan**

FERÐAVINNA
*Edvard Joensen*

**Vágar:** Útlendingar, sum koma til Føroyar at ferðast, leggja ikki heilt einki eftir seg her, halda tey, sum umsita kuningardiskin á flogvøllinum í Vágum.

Anna Sofía Nordendahl, ið arbeiðir á Kunningarstovuni í Vágum, sigur, at í bara tveir dagar her eftir ólavøsku, rindaði kunningardiskurin ikki færri enn 50.000,- krónur aftur fyri sølu av tollfríum - ella Tax



*Kuningardiskurin á flogvøllinum rindaði í tveir dagar eftir ólavsøku 50.000,- krónur aftur fyri tollfríar vørur, sum fremmand ferðafólk høvdu keypt í Føroyum*
*Mynd: Edvard Joensen*

Free - vørum í Føroyum.

– Tað merkir, sigur Anna Sofía Nordendahl, at tey hava keypt fyri eina fjórðings millión, ella har á leið, meðan tey hava verið í Føroyum.

Hon sigur, at talan er fyri heilt stóran part um føroyskar vørur, tey keypa. Troyggjur og aðrar vørur úr ull tykist vera tað heilt stóra, vísir hon á.

Tey feðrafólkini, sum tey við kunningardiskin serliga hava lagt merki til hesar dagarnar, eru norðmenn og bretar, sigur Anna Sofía Nordendahl. Men eisini føroyingar, sum búgva uttanlands, og hava verið heima og ferðast, tykjast keypa nógvar føroyskar vørur við sær, tá tey fara avstað aftur.